# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Dagurin

**22. januar. Vincentius**, deyður umleið ár 300 í Zaragoza. Píndur til deyða undir Diocletianus keisara.
Navnið er lanínskt og merkir *hin sigursæli*.

**23. januar. Emerentius**. Navnið er komið skeivt fyri; tað skal vera Emerentiana, deyð umleið ár 300 (í gomlum álmanakkum Emerent). Hon var vinkona við Agnas (sum varð tikin av døgum umleið ár 300) og var steinað til deyða, tá ið hon fylgdi vinkonuni og harðliga hevði at teimum, sum píndu og drupu hana.

**24. januar. Timoteus**, deyður umleið ár 68. Vinmaður og fylgisveinur hjá Paulusi ápostli, sum skrivaði honum tvey brøv. Eftir fornkirkjuligari frásøgu var hann eftir deyða Páls biskupur í Efesus, men toldi blóðvitnisdeyðan undir Nero keisara eins og ápostulin.
Grikst navn ið merkir: *tann sum óttast Guð.*

### 95 ára føðingardagur

Mánadagin 24. januar verður Zacharias Stórá, Skopun 95 ár.

### 85 ára føðingardagur

Mánadagin 24. januar verður Marjun Heimá, 85 ár. Dagurin verður hildin í KFUK sunnudagin 23. januar frá kl. 16.00-20.00.

### Brúdleyp

Í dag, 22. januar kl. 14.00 giftast í Bíggjar kirkju Rannvá Evaldsdóttir, Bøur og Eystein Jacobsen, Miðvágur. Opið hús verður í heiminum frá kl. 19.00.

## Eru vit smáir - eru vit knáir

# Leif Berg fyllir fimmti



Í morgin, 23. januar, fyllir ein vælkendur havnarmaður, Leif Berg, ríðilærari og ríðihallareigari, fimmti ár.

Hvør skuldi trúð tí, at hesin spelkni unglingurin fer um henda stóra marknasteinin nú? Í hvussu er ikki tey, sum regluliga síggja hann svinga seg í saðilin.

Sum so nógvir aðrir við Berg-eftirnavninum hevði Leif áhuga fyri tí sum rullar. Hann gjørdist tó ikki bilsmiður, men setti seg í gravimaskinur og lastbilar.

Frá rættiliga ungum árum hevði hann sína egnu fyritøku við maskinum og lastbilum og tók sær av jørð og betongarbeiði, eins og hann eisini arbeiddi fyri aðrar.

Eitt av teimum stóru arbeiðunum, sum hann hevði um hendi, var jørð- og betongarbeiðið í svimjihøllini í Havn og grótarbeiðið uttanfyri.

Í dag er hann millum teirra, sum regluliga sita og sveitta í baðstovuni, og orðna heimligar spurningar og "verðinsproblemini".

Yvirskriftirn er heintað frá árunum sum entreprenørur, tá hann brúkti hetta rámandi "logo" fyri at marknaðarføra fyritøkuna. Men spurningurin er, um hesi orð framvegis ikki kunnu brúkast.

Í øllum førum hevur Leif verið knávur í stríðnum at fáa ríðifyritøkuna BERG-hestar og ríðihøllina í Marknagili á føtur, sum í dag er týðandi partur í reiðvirkseminum her á landi.

Í kreppuárunum saðlaði Leif um - í bókstaviligum týdningi. Gravimaskinur og lastbilar vórðu sett, tá alt byggivirksemi helt uppat. Ístaðin fór at hann at byggja upp eina fyritøku við rossum.

Í smáum fór hann at skipa fyri ríðing fyri rørslu- og menningartarnað og ríðitúrum fyri ferðafólkum frá bústaðnum og trøðni við Marknagilsvegin.

Við hjálp frá vinum er henda vinnan spakuliga bygd upp, og í dag er ríðingin ein fittur partur í arbeiðnum at hjálpa um støðuna hjá rørslu- og menningartarnaðum og ein partur av ítrivinum hjá hesum íbúgvunum.

Í øðrum londum verður ríðing nógv brúkt sum terapi, tá talan er at hjálpa fólki, sum hava sálarliga sjúku, við góðum úrslitum, men so langt eru vit ikki komin enn.

Krúnan á verkinum - hóast verkið ongatíð verður liðugt hjá einum so arbeiðssomum manni sum Leif - er ríðihøllin í Marknagili, sum varð tikin í brúk fyri góðum trimum árum síðani.

Nú ber til at hava ríðing fyri tey handikappaðu inni og úr Marknagili er lættari at sleppa út á ríði- og bygdagøturnar við útlendskum og føroyskum ferðafólkum. Ja, tað er so, at alt fleiri landsmenn nýta høvi at fara ein ríðitúr við BERG-hestum. Og tey, sum hava verið einaferð, royna tað aftur. Tað er so, at øll eru før fyri at seta seg í saðilin á teimum væl vandu rossunum hjá BERG-hestum.

Tað eru nógv, sum hava sína regluligu gongd í ríðihøllina, og nógv - gentur og dreingir - hava gjøgnum árini tikið eina hond í við at sópa og geva. Afturfyri eru tey sloppin at ríða og mang-ir av teimum ungu "rúttarunum" eru vand upp hjá BERG-hestum. Ja, vit kunnu siga, at Leif hevur vakt áhugan hjá nógvum fyri ríðing og rossaumhvørvinum.

Uttan hetta og mangt annað sjálvboðið arbeiðið høvdu BERG-hestar neyvan verið komið so langt ávegis - enn í hvussu er. Leif hevur tann eginleika - við tí sjarmu hann hevur - at knýta fólk og vinir til sín og fáa tey at taka eina hond í.

Hóast arbeiðið tekur nógva tíð, eru eisini stundir at seta seg í saðilin og Leif er millum okkara fremstu reiðfólk, tá tað kemur til íslandsrossaríðing. Hann hevur vunnið nógvar kappingar í gonguløgum her heima, m.a. við ryssuni Stóð og hestinum Tór, og hann hevur eisini umboðað Føroyar uttanlands í altjóða kappingum. Men í hesum eru "vit enn smáir" - hóast vit royna at vera "knáir".

Áður reið Leif eisini kapp, men nú eru fleiri ár síðani, at hann royndi at koma fyrstur á mál í kappríðing. Ístaðin fyri hevur hann lagt seg eftir tí meiri kreativu gongulagsíðingini.

Harafturat er áhugurin fyri handboltinum vaksin síðstu árini, so hann er ikki so tíðum á ríðitúrum sunnudagar meiri, tá dystir verða leiktir.

Men tíð hevur hann framvegis til vinir, kenningar og okkurt rossaprátið, tí altíð er hann blíður og fryntligur, tá komið verður í høllina ella á gátt.

Hjartaliga tillukku og alt tað besta í framtíðini, sum óivað fer at hava stórar og spennandi broytingar við sær í næstum.

Vinarliga

**Stígandi og Fjalar**

# Framsýning í Miðvági



*Møðvágs Fornminnisfelag fer at hava framsýning av gomlum myndum, har ein partur fer at vísa gamla prestagarðin í Jansagerði*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvágs Fornminnisfelag fer leygardagin í næstu viku at skipa fyri myndaframsýning við gomlum myndum úr Miðvági**

FRAMSÝNING

Leygardagin í føstuinngangi verður forkunnug framsýning í Miðvági, sum Miðvágs Fornminnisfelag skipar fyri.

Felagið sigur soleiðis í tíðindaskrivi:

Miðvágs Fornminnafelag skipar fyri framsýning av gomlum myndum úr Miðvági leygardagin 5 februar 2005 frá kl. 15.00 til 21.00. Tær elstu myndirnar eru frá umleið 1890-1900, men flestu myndirnar eru persónsmyndir frá umleið 1930-1940. Absalon Joensen prestur hevur avmyndað. Nakrar forvitnisligar myndir eru av grindadrápi umleið 1910.

Høvið verður at síggja tekningar av gamla prestagarðinum í Jansagerði og øllum teimum bygningum sum hoyrdu til húsini. Harafturat eru skjøl um avgerðinar, tá íð prestagarðurin varð niðurtikin og uppisitarahúsini vóru flutt á prestagarðsgrundina til skjals.

Forminnafelagið skipar eisini fyri køkutombola og høvið verður at keypa sær ein drekkamunn við onkrum góðum afturvið.

Atgongumerkir á 20,00.

Hendan dagin er ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin.

**Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin**

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**